# Merkisdagar

## Diamantbrúdleyp
Fríggjadagin 20. mai 2011 kunnu hjúnini Esther og Eivind Petersen, Oyndarfjørður hátíðarhalda 60 ára brúdleypsdag. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 17. Tey, ið vilja gleða okkum við at halda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf. 444529 ella 444501 innan 13. mai.

## Brúdleyp
Leygardagin 21. mei kl. 15 giftast Katrin Hensiudóttir og Sjúrður Jacobæus í Gamle Vor Frue Kirke í Roskilde. Brúðarveitslan verður hildin á Byleddet 3D, Roskilde fyri innbodnum.

## Brúdleyp
Leygardagin 2. juli giftast Rannvá Arge Funn úr Vestmanna og Dagfinnur Jensen úr Skopun. Vígslan verður í Skopunar kirkju kl. 14. Vælkomst verður í Samljóð í Skopun kl. 18.30. Tey sum vilja gleða okkum, við at halda dagin saman við okkum, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 20. juni á tlf. 361600.

## 80 ára
Fríggjadagin 13. mai hevur Heðin í Dali 80 ára føðingardag, sum verður hildin saman við børnunum.

## 60 ár
16. mai fyllir Jórun Thomsen, Sumba, 60 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 21. mai frá kl. 15.

## Fermingar
Sunnudagin 15. mai verður **Bjarki Arge Andreasen**, sonur Karoline Arge Andreasen og Sámuel Andreasen, fermdur í Taulov kirkju.
Sunnudagin 15. mai verður **Helena H. Glyvradal**, dóttir Anniku H. og Jákup Glyvradal, fermd í Tersløse kirkju.
**Sofie Nissen**, dóttir Jóndis J. Henriksen av Sandi, verður fermd í Glumsø kirkju dýra biðidag.



## Gullbrúdleyp
Fríggjadagin 27. mai hava vit Dora Várlíð og Eivind Fróði Jacobsen, Sørvágur, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í missiónshúsinum í Sørvági kl: 19:00. Tey ið ynskja at gleðast saman við okkum henda dagin, verða vinarliga biðin um at siga frá innan sunnudagin 15. mai á tlf 33 21 33 ella 28 63 69.



## 25 ára starvsdagur
15. mai 2011 hevur Ingeborg Godtfred arbeitt í 25 ár sum stjórnarskrivari hjá Elfelagnum SEV.



## Brúdleyp
Tann 19. mai giftust í Bangkok, Ragnar Absalonsen úr Havn og Saijai Bootan úr Phuket í Teilandi.

**Miðvágs Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14:00 sunnudagsskúli og møti kl. 18:00. Næmingar frá bíbliuskúlanum PODAS luttaka. Vit fáa vitjan úr Sandavági. Felagsnátturði aftaná. Hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Fríggjakvøldið kl 19 juniormøti.
Leygarkvøldið kl 20 ungdómsmøti við Kristian Martin Petersen, evni: Kristin á internetinum.
Sunnudagin kl 13,30 sunnudagsskúli, kl 18 møti við Sylverus Jacobsen. Barnaansing. Øll hjartaliga vælkomin

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøld kl 21, Awake vid ungdómsleiðsluni
Sunnudagin kl 17, Møti við Paula Høj. Sangur við Annbritt Lamhauge. Barnamøti kl 18. Vælkomin í Kelduna.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadag 13. mai kl. 21:00 Ungdómsmøti
Sunnudag 15. mai kl. 17:00 Møti v/ Sverra Kass
kl. 17:00 Sunnudagsskúli.

**Fuglafjarðar kirkja**
Leygarkvøldið 14. mai kl. 20.00 verður konsert við Fuglafjarðar Sangkóri.

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Sunnudagin kl. 11: Breyðbróting. Týskvøldið kl. 20: Bønar-og uppbyggingarmøti.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl 13.30 verður sunnudagsskúli og kl. 18 verður møti við Hanus í Gørðum. Evni: Sjúka, bøn og salving av sjúkum. Øll eru hjartaliga vælkomin. Meiri kunning á www.leirvikar.fo

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøld kl 17.00 bønarmøti
Sunnukvøldið kl 18.00 møti v/ Fríðtór Debes

**Getsemane**
Stangaskákið 1, Klaksvík
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti v/ Rógva Joensen.
Barnamøti er samstundis
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti v/ breyðbróting

**KFUM & K Klaksvík**
Sunnudag kl.14.00 Sunnudagsskúli, kl.17.30 Bønarløta, kl:18.00 Møti við Marjan Kass Nielsen, har hon kemur at greiða frá altjóða Lausanne ráðstevnan sum varð hildin í Cape Town í Suðurafrika. kl.21.00 Ungdómsmøti.

**Missiónshúsið á Vidareiði.**
Møti verður í missiónshúsinum á Viðareiði sunnudagin kl.18.00 við Kristian Frírik Olsen og ørðum í KFUM & K í Klaksvík. Øll hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Sandi**
Sunnudagsskúli kl. 14 og møti kl. 18.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti v/Petur og Ninu Poulsen.

**Betania, Skopun**
Fríggjadagin 13. mai kl 21: To Share, ungdómsmøti.
Sunnudagin 15. mai kl 15: Sunnudagsskúli
Sunnudagin 15, mai kl 17: Møti, Einar Joensen talar. Nátturði verður aftaná møtið.
Mikudagin 18. mai kl 20: Bønarmøti.

**Missiónshúsið, Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14.00 verður sunnudagsskúli. Møti kl. 18.00 við Árna og Michelu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Fríggjadagin kl 09.30: Orðið á borðið.
Sunnudagin kl 11.00: Sunnudagsskúli. Kl 18.00 møti v/ Solberg, Sigmund og Ben Eli. Øll eru vælkomin.
Mánadagin kl 20.00: Bønarløta.
Týsdagin kl 09.30: Orðið á borðið.

**Pílagrímsgonga**
Sunnudagin verður skipað fyri pílgrímsgongu í Suðuroy. Bussur koyrir frá Bønhúsinum í Øravík kl. 9.30. Kl. 10 verður byrjað við pílagrímsgudstænastu í Fámjins kirkju. Síðan verður gingið um Øraskarð og Tingstovuna til Øravíkar, har ein stutt gudstænasta við altargongd verður í Bønhúsinum uml. kl. 13. Tilmelding. Neyvari skrá og kunning liggur á heimasíðunum: folkakirkjan.fo og kunning.fo

**Gongutúrur: Kirkjubønes**
Farið verður frá Kunningarstovuni kl. 10. Havið heit og góð gonguklæði, ein heitan drekkamunn og matpakka við. Tilmelding á tlf. 302425 ella torsinfo@torshavn.fo

**Pensionistafelagið í Havn**
Limirnir hittast í Bowlinghøllini Heykavegi 1 á Hálsi mikukvøldið 18. mai 2011 kl. 19. Kostnaður 50,- krónur.

**Eysturoyar Gongufelag**
Gongutúrur verður sunnudagin 15. mai 2011. Gingið verður Sandavágur – Húsafelli
Vit møtast við kommunuskrivstovuna í Sandavági kl. 14.00.
Túrurin er miðal.Frásøgumaður verður við.

**Útferð í Sandoynna**
Pensionistafelagið í Havn skipar fyri útferð í Sandoynna dýrabiðjudag, 20. mai 2011. Farið verður við Bygdaleiðum av Farstøðini kl. 9.20. Heim aftur verður farið kl. 16.30 av Skopum.
Kostnaður fyri ferðina fram og aftur og døgurðu 150 krónur fyri hvønn.
Luttakarir tekna seg hjá einum av nevndarlimunum, telefon 311756, 228138, 210621, 213244 ella 222733.
Nevndin

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
tlf. 316491/286491
Teldupostur: tilhald@torshavn.fo
Drekka er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks
Mánadagur 16. mai
09.00 - 16.00 Motiónsrúmið opið. Í motiónsrúminum er rógvimaskina, kondisúkkla, renniband og krossari. Øll eru hjartaliga vælkomin
10.00 Fimleikur kvinnur, Grete Ellingsgaard
14.00 Kortspæl og onnur spøl
Týsdagur 17. mai
09.00 - 16.00 Motiónsrúmið opið. Øll eru hjartaliga vælkomin
10.00 Vit syngja Jóhann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
14.00 - 16.00 Prát
Túrur:
Mikudagin 18. mai kl. 8.30 verður farið úr Havn til Suðuroyar. Við bussi til Sumbiar, frásøgumaður verður Eli Poulsen. Døgurði í Øravíka. Áðrenn farið verður til Sandvíkar. Av Tvøroyri kl. 18.30. Hittast umborð á Smyrli kl. 8.30. Flóvin Jacobsen og harmonikan verða við á túrinum.
Tilmelding: 316491.
Kostnaður 380,- (íroknað ferðing, bussur, døgurði og frásøgufólk). Gjaldast í seinasta lagi mánadagin 16. mai. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mikudagur 18. mai
09.00 - 16.00 Motiónsrúmið opið
09.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð
13.00 Bindiklubbur
15.00 Túrur
Hósdagur 19. mai
09.00 - 16.00 Motiónsrúmið er opið
10.00 Fimleikur kvinnur, Grete Ellingsgaard
14.00 - 16.00 Prát